## Skúlabygging í Hósvík

Í farnu viku undirskrivað Heðin Zachariasen, borgarstjóri og Finn Christensen vegna byggifyritøkuna Arbor avtalu, har felagið átekur sær at byggja eina lon afturat verandi skúla í Hósvík. Teknistovan A3 hevur teknað nýggja skúlan. Talan er um tilsamans 500 fermetrar, við trimum skúlastovum og øðrum hølum til skúlabrúks. Verandi skúli skal nýtast til ymisk serhøli. Við í byggingini verður eitt rúmligt felagshøli, ið kann nýtast til ymisk tiltøk á skúlanum. Kostnaðurin fyri arbeiðið fer at liggja um 8 milliónir krónur, og sambært avtaluni skal nýggi bygningurin standa liðugur til skúlaársbyrjan 2008.



## Øll lesa Potter

Heimasíðan hjá Føroya Lærarafelag skrivar, at bæði gentur og dreingir á øllum floksstigum hava lisið eina ella fleiri bøkur um unga gandakallin. Tað framgongur í eini stórari lesikanning, sum Solveig Debess, master í barnabókmentum, hevur gjørt um lesivanarnar hjá føroyskum børnum og ungum. Sambært kanningini hava tey flestu lisið bókina á føroyskum. Til ber eisini at staðfesta, at norsk, svensk og donsk børn lesa bøkurnar um Harry Potter fyrr enn tey føroysku lesa tær. Og sambært Solveig Debess kemst hetta uttan iva av, at føroysk børn læra seinni at lesa enn norðurlendsku javnaldrarnir,

# Skaðar kosta 300 mió. kr.

**Forstjórin á Thor roknar við, at tað fer at kosta einar 300 mió. krónur at umvæla risatrolarnar hjá felagnum. Umvælingin av Hercules kemur helst upp á 200 mió. krónur, meðan Athena fer at kosta einar 100 mió. kr.**

UMVÆLING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Sjálvt um altjóða reiðaríið í Hósvík hevur verið sera óheppið í seinastuni við tveimum eldsbrunum umborð á skipum, so hevur leiðslan í Thor ikki mist mótið av teirri orsøk.

Í dag fór fyrri nýbygningurin á Skála av bakkastokki, sum er eitt 55 metra langt veitingarskip, ið kostar 75 mió. krónur at byggja. Skipið skal vera liðugt í november, tá tað fer í vinnu. Í løtuni verður stál skorið til næsta skipið, sum verður eitt systirskip til Thor Alpha, sum hetta skipið eitur.

Upphæddin fyri tey bæði skipini er tó bert helmingurin av, hvat tað fer at kosta at umvæla risatrolararnar Hercules og Athenu, sum eldur kom í ávikvist 21. apríl og 4. juli. Tíbetur fyri felagið eru skipini væl tryggjaði, tí sambært forstjóranum í Thor, Hans Andrias Joensen, fer umvælingin av Hercules at kosta 200 mió. kr. og á Athenu 100 mió. kr.

Sambært forstjóran koma eldsbrunarnir ikki at hótta felagið á nakran hátt, men givið er, at felagið missir stórar inntøkur, meðan skipini ikki eru í fiskiskapi.

Spurdur um tað ikki hevði loyst seg betri at bygt nýtt, sigur Hans Andrias Joensen, at tað ger tað langt frá. Bara annað skipið kostar góðar 400 mió at byggja sum nýbygningur. Hartil er leveringstíðin eisini sera long.



*Eldsbrunarnir umborð á ristrolarunum hjá Thor, sum báðir fiska í áltjóða sjógi í Kyrrahavinum, hótta ikki reiðaríið á nakran hátt, men koma at kosta reiðarínum nógv í mistum inntøkum, sigur Hans Andrias Joensen, forstjóri*

# So kom Potter endiliga

**Longu langt áðrenn midnátt fríggjakvøldið høvdu Harry Potter fjepparar stillað seg í røð í SMS, tá sjeynda og seinasta bókin hjá J. K. Rowling kom á hillarnar**

ÚTGÁVA
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

76 bøkur av frumútgávuni á enskum um Harry Potter fóru um diskin, tá Rit og Rák í SMS skipaði fyri útgávukvøldi náttina til leygardagin. Tá tey flestu høvdu ognað sær útgávuna, fekk týðarin av fimtu og sættu bókini, Bergur Rasmussen, sum eisini skal týða hesa, orðið. Hann vísti millum annað á, hvussu ovurhondsstórur áhugin er fyri Harry Potter.

- Tá eg nú ein dagin googlaði á Harry Potter komu ikki minni enn 155 mió. leinkjur fram. Hetta vísir, at hann er eitt fenomen á netinum, eins og Elvis Presley og Beatles vóru tað í útvarpi og sjónvarpi.

Kári Árting úr Rit & Rák visti ikki, hvussu nógv høvdu verið í handlinum, men metti, at tað vóru oman fyri 100, tá tey vóru upp á tað mesta.

Bergur Rasmussen væntar at vera klárur við umsetingini síðst í september, og bókin »Harry Potter and the deatbly hallows« skal eftir ætlan vera í bókhandlunum á føroyskum um hálvan november.




*Bergur Rasmussen við frumútgávuni av sjeyndu og seinastu bókini um víðagitna Harry Potter, sum hann nú fer undir at týða. Seinast brúkti hann seks vikur til týðingina, men hendan bókin er rúgvusmiklari, og tí kemur hann eisini at brúka longri tíð til týðingina hesaferð*



*Tá mest var av fólki í Rit & Rák fríggjakvøldið og náttina til leygardagin, í sambandi við útgávuna um Harry Potter, vóru omanfyri 100 fólk í handlinum. Her eru tríggir Harry Potter fjepparar*

# Friðarligt vikuskifti

**Sjálvt um stór tiltøk sum G í Gøtu og bryggjudansur í Havn hava verið um vikuskiftið, so hevði vælmannaða løgreglan lítið onki at gera**

LØGREGLA
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Útpurring av fullum fólki og ólógliga parkeraðir bilar vóru stórt sæð einastu uppgávur, sum politiið í Havn og Runavík skuldu taka sær av, sjálvt um stór tiltøk sum G og bryggjudansur við túsundtals gestum vórðu hildin uppundir og í viskuskiftinum.

Ongin harðskapur fór fram – í øllum førum ikki sum løgreglan fekk boð um – hóast túsundtals føroyingar høvdu leitað sær til Gøtu frá hósdegnum og oman í Vágsbotn leygarkvøldið.

Um tað var dýrdarveðrið, sum hevur ávirkað hendingaríka vikuskitið, kann bara gitast um, men okkurt kundi týtt uppá, at hetta hevur havt jaliga ávirkan.

Í sambandi við G hevði løgreglan í Runavík fingið hjálp úr Havn, og tað vóru á leið 20 løgreglufólk til arbeiðis ígjøgnum døgnið.

Sambært vakthavandi í bæði Runavík og í Havn gekk alt fyrimyndarliga fyri seg.

Undanfarnu árini hevur verið møguligt at steðga og parkera á landsvegnum oman fyri Syðrugøtu at fylgja G, men hetta hevði løgreglan sett forboð fyri í ár. Kortini vóru nógvir bilar ólógliga parkeraðir, sum løgreglan gav boð um at flyta.

Ein bilførari varð tikin fyri at koyra ávirkaður av rúsdrekka. Hetta var náttina til leygardagin.

Vakthavandi í Runavík sigur, at bæði Reyði Krossur og Blái Krossur gjørdu eitt stórt arbeiði fyri, at alt skuldi ganga væl, og at hetta sá út til at eydnast til fulnar.